





## Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 26.000 km. Hevur ljós leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Er sum nýggjur bæði innan og uttan.

Verður seldur, um hóskandi boð fæst

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**

# Heini gevst á Bullguard

**Hoyvíkingurin, Heini Zachariasen, sum í fimm ár hevur sitið í stjórastólinum hjá danska Bullguard, fer nú at leita sær nýggjar avbjóðingar**

VINNULÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heini Zachariassen hevur seinasti fimm árini verið stjóri hjá Bullguard, ið fyrst og fremst selur loysnir til virus-verju.

Hesi árini er fyritøkan vaksin frá teimum trimum, sum stovnaðu Bullguard, til eina fyritøku, sum í dag telur 100 starvsfólk. Og sum hevur ein umsetning, sum hvørt ár er meira enn tvífaldaður.

- Hetta hevur verið ein ótrúliga spennandi tíð. At menna fyritøku frá grundini, fáa brand´ið fram hjá almenninginum og at fáa lønsemi í virksemið hevur verið ein sera stór avbjóðing, og eg eri fegin um, at vit saman hava rokkið hesum málum, sigur Heini í tíðindaskrivi, sum Bullguard sendi út í morgun.

Við portalin sigur Heini, at hann enn ikki vil avdúka, hvat hann fer at takast við komandi tíðina.

- Heilt einki verður tað tó ikki. Næstu seks mánaðirnar fari eg at arbeiða við nøkrum heilt øðrum, og so fáa vit at síggja, hvat framtíðin annars hevur at bjóða, sigur hann.

Heini Zachariassen, sum er 35 ára gamal, er eisini nevndarformaður í Føroya Tele, nevndarformaður í Fremad Amager Invest og nevndarlimur í íløgufelagnum, Set.

Hóast hann nú gevst í Bullguard, er Heini framvegis ein av høvuðspartaeigarunum í fyritøkuni.



*Enn vil Heini Zachariassen ikki siga, hvat hann fer at nýta komandi tíðina. Men talan verður um okkurt heilt annað, sum hann málber seg*

## Marknaðarfólk til Sosialin

**Starvslýsing**

Ert tú fyrikomandi, dugir væl at selja, ert álítandi, røkin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir tveimum starvsfólkum, sum kunnu verða við til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa, og ikki minst, arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum og temabløðum. Umframt hetta, verður tú ein týðandi partur av søluarbeiðinum hjá Sosialinum, Rás2, S-lýsingum og Portalinum.
Løn verður ásett sambært avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til Sosialin. Ynskir tú at fáa meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tel. 341823/222081.

Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Størvini verða at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er mánadagin 14. apríl og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
Att.: Gudny Langgaard
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir í dag um tríggjar miðlapallar. Blaðútgávu, tíðindaflutning á netinum og útvarp. Tilsamans starvast um 45 fólk í samtakinum.

Sosialurin
Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

